## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, um kvøldið av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul millum norðan og vestan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin frískar hann vindin av útsynningi og sum frálíður regn. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin gul av vestri og yvirhøvur turt, men týsdagin frískar hann vindin av suðri og sum frálíður regn. Hitin millum 12 og 16 stig.

Hotel Djuurhus á Áarvegnum:

# Tjøra húsini við hjálp frá kranabili




VIÐLÍKAHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*

Við Áarvegin standa eini gomul hús, eisini kallaði Hotel Djuurhus ella Vertshúsið. Elsti partur av húsinum er eini 300 ára gamal, meðan nýggjasti parturin stavar heilt afturi frá aldarskiftinum um ár 1800 – 1900.

Fyrr var vanligt, at hús í Føroyum vórðu tjøraði, og fyri einum ári síðani hildu íbúgvarnir á Hotel Djuurhus, at hesi húsini áttu eisini at fáa ein umgang við tjøru.

Seinasta summar fekk húsið so sín fyrsta umgang á hesum sinni, og í hesu vikuni var túrurin komin til enn ein umgang.

Men tá ein ikki hevur hug at órógva ferðsluna, sum koyrir í stórum tali eftir Áarvegnum, so eru góð ráð dýr.

Um íbúgvarnir settu in stiga ella eitt stillads upp á vegnum, so hevði hetta tarnað ferðsluni, og hesum vildu íbúgvarnir helst sleppa undan.

Tey funnu tó eina aðra loysn, og ringdu eftir einum kranabili. Bilurin stillaði seg í túnið, síðan varð málarin lyftur upp við krananum og lokið latið av tjørublikkinum.

Jórun í Dali, sum leigar ein part av húsinum til teknistovu, er væl nøgd við hesa loysn.

- Tá vit smíðaðu á húsinum fyri eini tíð síðani, máttu vit lata alla gøtuna aftur. Hetta tarnaði sjálvandi ferðsluni, og hesum vildu vit sleppa undan hesuferð. Men kranabilurin royndist okkum heilt væl, og vit eru væl nøgd við úrslitið, sigur hon í stuttari viðtalu.

Á Hotel Djuurhus rúmast eisini radioverkstaðið hjá soninum Brandi í Dali. Brandur eigur sjálvur húsini, meðan Jórun leigar ein part til teknistovu sína.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | 15 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 19 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 30 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1010 hPa yviri á Suðurlandinum fer í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1026 hPa á 51N-34v fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og gevur góðveður á okkara leiðum um vikuskifti.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/07 kl. 06[00]– 18/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/07 kl. 06[00]– 18/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 12,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. juli: Full sól
30. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 19. juli | 03.12 | 15.37 | 02.12 | 14.37 | 02.27 | 14.52 | 05.12 | 17.37 | 06.12 | 18.37 | 01.27 | 13.52 | 00.27 | 12.52 | 03.27 | 15.52 | 04.27 | 16.52 | 02.57 | 15.22 | 04.12 | 16.37 |
| 20. juli | 04.02 | 16.28 | 03.02 | 15.28 | 03.17 | 15.43 | 06.02 | 18.28 | 07.02 | 19.28 | 02.17 | 14.43 | 01.17 | 13.43 | 04.17 | 16.43 | 05.17 | 17.43 | 03.47 | 16.13 | 05.02 | 17.28 |
| 21. juli | 04.54 | 17.21 | 03.54 | 16.21 | 04.09 | 16.36 | 06.54 | 19.21 | 07.54 | 20.21 | 03.09 | 15.36 | 02.09 | 14.36 | 05.09 | 17.36 | 06.09 | 18.36 | 04.39 | 17.06 | 05.54 | 18.21 |
| 22. juli | 05.49 | 18.15 | 04.49 | 17.15 | 05.04 | 17.30 | 07.49 | 20.15 | 08.49 | 21.15 | 04.04 | 16.30 | 03.04 | 15.30 | 06.04 | 18.30 | 07.04 | 19.30 | 05.34 | 18.00 | 06.49 | 19.15 |
| 23. juli | 06.42 | 19.08 | 05.42 | 18.08 | 05.57 | 18.23 | 08.42 | 21.08 | 09.42 | 22.08 | 04.57 | 17.23 | 03.57 | 16.23 | 06.57 | 19.23 | 07.57 | 20.23 | 06.27 | 18.53 | 07.42 | 20.08 |

5 707265 100050 >